




Johnny Priess, handilsleiðari í Miklagarði, ynskir Jarmundi Berthelsen, innan Glyvur, tillukku við vørunum, sum hann vann í kappingini hjá Sosialinum, tá hann slapp at fylla sær vognin í Miklagarði í 10 minuttir







Jarmund Berthelsen, innan Glyvur:

# Størsta innkeypið nakrantíð

**57 vørur fyri 4.876 krónur. Tað var tað, sum Jarmund Berthelsen kláraði at »keypa« í Miklagarði upp á 10 minuttir. Jarmund vann haldarakappingina í sambandi við at Sosialurin fylti 75 ár**

VINNINGUR
*Eirikur Lindenskov*

– Eg visti einki um, at eg hevði vunnið, fyrr enn beiggi mín ringdi umborð og ynskti mær tillukku.

Hetta sigur Jarmund Berthelsen, innan Glyvur, sum var tann hepni vinnarin í haldarakappingini hjá Sosialinum í sambandi við at Sosialurin fylti 75 ár 24. mai í ár.

Jarmund Berthelsen er meistari umborð á Brimli, og tað var beiggi hansara, sum siglir við Dragasundi, sum hevði verið á Havnini eftir ísi – og keypt Sosialin, sum ringdi umborð á Brimil til beiggjan.












*Jarmund Berthelsen, innan Glyvur, við vørunum, hann megnaði at fylla í vognin upp á 10 minuttir*









Vinningurin hjá Jarmundi var, at hann kundi fylla sær innkeypsvognin í Miklagarði í 10 minuttir. Treytin var, at hann bert skuldi taka eina vøru av hvørjum slag, og hann skuldi ikki taka fleiri vørur, enn tær, sum passaðu í vognin. Tær vørurnar, sum komu ígjøgnum kassan innan 10 minuttir, vóru hansara.

Jarmund sigur, at hann er vanur at keypa inn í Miklagarði, so hann kendi handilin, og hetta var kanska ein fyrimunur, tá hann skuldi velja sær »bestu« vørurnar. Hann keypti eitt nú barnaklæði, Victorinox knívar, gafflar og skeiðir, kjógv, steikir av ymsum slag, blaður – men fyrst av øllum mintist hann til at keypa eitt blómutyssi til konuna.

– Knívarnir treingja til at verða skiftir nú, tí vit hava búð í húsunum í fimtan ár, segði Jarmund.

Hóast Jarmund ikki beinleiðis spurtaði runt millum hyllarnar í Miklagarði, so kláraði hann at »keypa« 57 vørur, sum tilsamans kostaðu 4.876 krónur. Tann dýrasta var ein stór oksasteik fyri 332 kronur og 45 oyru.

– Hetta er størsta innkeypið eg nakrantíð havi gjørt í einum matvøruhandli, segði Jarmund við einum smíli, tá hann fylti sær vørurnar í posan.

Johnny Priess, sum er handilsleiðari í Miklagarði, segði, at Jarmund nýtti 9 minuttir og 15 sekund frá tí hann fekk 10-krónuna til innkeypsvognin, til síðsta vøran var komin gjøgnum kassatólið.

– Ja, hetta vísir bara, at tað skjótt og gott at keypa inn í Miklagarði, sigur Johnni við einum smíli, meðan hann hjálpir Jarmundi at fáa posarnar í vognin.

Johnny sigur, at teir fyrr hava havt líknandi kappingar, og at hann hevði mett frammanundan, at Jarmund fór at keypa fyri einar 5.000 krónur.

Hann heldur, at Jarmund tók tað nokkso róligt, men innkeypið var kortini gott nokk, heldur hann.

Sosialurin ynskir Jarmundi tillukku!





